Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Fía Selma Nielsen, løgtingskvinna

Svarari: Margit Stórá, landsstýriskvinna í almanna- og bústaðamálum

Evni: Rættstundis hjálp til sálarsjúk

Spurningar:

1. Hvørjum ítøkiligum verður arbeitt við fyri at borgari, sum ikki er væl fyri, altíð skal vera í miðdeplinum?
2. Verður arbeitt við, at sjúk fólk hava møguleikan at venda sær til eitt stað – og fáa ta vegleiðing og hjálp sum tørvur er á og sum hjálp kann veitast til?
3. Hvat verður gjørt, tá tann, sum hevur stóran hjálpartørv, ikki sjálvur megnar at taka fyrsta stigið ella taka ímóti hjálpini?

Viðmerkingar:
Samgongan skrivar í samgonguskjalinum at: “Vit skulu hava eitt gott og vælvirkandi almannaverk, sum veitir hjálp og vegleiðing til tey, ið hava tørv á tí. Borgarin skal altíð vera í miðdeplinum og hava møguleika fyri at fáa ein innihaldsríkan gerandisdag við so góðari lívsdygd sum gjørligt.”

Í Føroyum hava vit sera góðar møguleikar at hjálpa teimum sum hava hjálp fyri neyðini, og tí eiga fá at “detta niðurímillum” sosialu skipanirnar.

Afturvendandi er at hoyra í almenna rúminum um menniskju, sum stríðast óneyðugt. At tey eisini stríðast, tí tey skulu samskifta við fleiri almennar stovnar.

Tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 26. august 2026

Fía Selma Nielsen